# Ferðamaðurin aftrar seg við at koma til Norðoyggjar

**Hetta sigur Christian Olsen, leiðari á Norðoya Kunningarstovu. Hann heldur, at ferðasambandið til Norðoyggjar og upplýsingin um broytingarnar á farleiðunum hava verið út av lagi vánaligar í vár og tað, sum farið er av summarinum**

FERÐAVINNA
*Jákup Mørk*



*Christian Olsen, leiðari á Norðoya Kunningarstovu, heldur at, viðurskiftini viðvíkjandi ferðasambandinum til Norðoyggjar eru út av lagi vánalig*

**Klaksvík:** – Alt byrjaði í vár við verkfallinum, sigur Christian.

Hann greiðir frá, at mynstrið hjá ferðafólkunum, sum koma hendan vegin er og hevur verið, at á vári koma tey eldru ferðafólkini. Tey koma ofta til landið, áðrenn summarfrítíðin byrjar, og steðga í eina viku. Tey ferðast í pørum ella í bólkum upp á millum 20 og 25 fólk. Tá tey einans steðga í eina viku, so vilja tey sjálvandi nýta tíðina fult út til at koma so víða um í landinum, sum gjørligt. Men tað lat seg ikki gera í vár, orsakað av verkfallinum. Serliga áðrenn greiða var fingin á Suðuroyarleiðini. Tá komu ferðafólkini ferð eftir ferð út fyri, at tey stóðu í Fuglafirði og bíðaðu eftir Scaniu, og so sigldi Dúgvan av Leirvík, ella umvent.

– Og tað tímir ferðamaðurin ikki. Tí hann hevur goldið nógvan pening fyri at koma her, og so vil hann sjálvsagt hava nakað fyri peningin, sigur Christian, sum heldur tað vera út av lagi vánaligt, at fráboðaninar um broytingar á teim ymsu farleiðunum bara eru á føroyskum.

Christian heldur fram, at tá so verkfallið var av, og viðurskiftini um Leirvíksfjørð komu í rættlag aftur, ja, so bleiv Eysturoyarbergholið stongt.

Tað er so lagi við tí, tí trygdin hevur sjálvandi alt at siga, men tá tú kom til bergholið, so stóða at lesa á tí fremsta skeltinum: The tunnel is closed! Á tveimum skeltum aftan fyri, stóð so á føroyskum at bussar og tung ferðsla var undantikin og at leiðin gongur annars um Eiðisskarð.

– Hvussu í allari víðu verð, skal ein hollendingur ella onkur annar útlendingur vita tað, tá tað bara stendur á føroyskum?? spyr Christian, og leggur aftur at, hvat ger ein útlendingur, sum kemur til eitt skelti, sum sigur, at bergholið er stongt?? Hann vendir sjálvandi 180 gradir og fer tískil slettis ikki norður um, tí hann er jú ikki greiður yvir, at tað er ein annar vegur.

Og so oman á alt hetta, so skuldu teir spreingja oman fyri Skipanesi seinasta hósdag og bleiv tann vegurin so stongdur frá klokkan hálvgum sjey á kvøldi.

– Tað bleiv lýst líka frá morgni av, og tað er heilt vist, at av tí sama settust fólk aftur at koma norðureftir, heldur Christian. Hann skilir ikki, hví teir skulu steingja handan vegin so tíðliga á kvøldið fyri at spreingja og so á einum so føgrum summardegi, sum hósdagurin var.

– Spreingja kunnu teir saktans gera seinni á kvøldið.

Christian heldur, at tað er sera harmiligt, at her er ein keðilig støða, sum tað ber til at gera okkurt við, men tað verður bara ikki gjørt nakað.

– Tá vit hava spurt okkum fyri, um ikki okkurt kann verða gjørt, so er svarið bert, at tað verður hugt eftir málinum.

### Umstøðurnar vánaligar

At tað ofta er rokaligt á ferjulegunum bæði í Klaksvík og í Leirvík er staðfest ferð eftir ferð.

Christian tekur sjálvur eitt dømi. Hann skuldi til Havnar og setti tí bilin í røðina klokkan fýra seinnapartin, men slapp ikki yvir um fyrr enn túrin klokkan trý korter til seks.

Tað er bert tað eina skipið um Leirvíksfjørð og tað skal bæði flyta frakt og ferðafólk, og so er tað bert ein spurningur um, hvør vinnan er tann sterkara, tá tað kemur til, hvør sleppur við.

– At bjóða ferðafólkum at fyrst verða noydd at bíða í tímavís fyri at sleppa við Dúgvuni, og so, tá tey koma umborð, at troðka seg í millum bilarnar við bæði skrelli, fiski og aðrari frakt, tað er ov nógv av tí góða, heldur Christian, sum vísir á, at tað negativa ofta hoyrist bæði skjótari og betri enn tað positiva.

– Tey, ið selja ferðir, hava í ár aftra seg við at selja ferðir til Norðoyggjar, tí viðurskiftini hava verið so ógreið, og tað kunnu vit ikki góðtaka.

Hann heldur eisini, at tað verður alt ov tungt at byggja eina ferðavinnu upp í útjaðaranum, tá ferðasambandið ikki er regluligt og til at líta á.

– Tí ferðafólkini hava eina stutta tíð her, og tey vilja hava sum mest burtur úr. Tey skula helst kunna fara úr aftur Føroyum við einum góðum minni. Ikki einum minni, um at tey ferð eftir ferð høvdu trupulleikar við at koma har til, sum tey ynsktu at koma, sigur Christian Olsen, sum at enda vísir á, at tað er ikki bert í Norðoyggjum at hesin trupulleikin er.

# Nýggj bók um skaldið Christian Matras

BØKUR
*Tíðindaskriv*



Í februar 2001 vardi Anne-Kari Skarðhamar, fyrsti amanuensis við læraraútbúgvingina á Høgskolen í Olso, ph.d.-ritgerð sína um skaldskapin hjá Christian Matras. Í metingarnevndini sótu Leif Mæhle professari, Olso, W. Glyn Jones professari, Norfolk, Onglandi, og Malan Marnersdóttir rektari, Tórshavn. Heitið á ritgerðini var Poetikk og livstolkning i Christian Matras' lyrikk - med et tillegg om Matras og færøysk lyrikk.

Ritgerðin er nú útkomin í bók á Unipub-forlagnum í Oslo, sum í samstarvi við Føroya Fróðskaparfelag hevur latið prentað serupplag sum Supplementum til Fróðskaparrit.

Í formælinum til ritgerðina sigur Anne-Kari Skarðhamar, at fyrstu ferð hon hoyrdi um Christian Matras var, táið hon byrjaði universitetslestur í norskum í 1968 og las »De fortabte spillemænd« eftir William Heinesen. Har vísir frásøgumaðurin til »dr.phil. Christian Matras' karakteristikk av fiksjonens lyriker, Sirius«. Hetta sama árið um heystið var hon lestrarferð í Føroyum og fekk innivist hjá Christian Matras og konuni Marionnu, sum hon seinni hevur skrivað bók um: »Dreymurin um at veva«. Hesa bók gav Norðurlandahúsið í Føroyum út í 1996.

Í níti árunum hevur hon á hvørjum ári verið í Føroyum og vitjað Marionnu, og hjá henni havt atgongd til bókasavn, upprit og handrit hjá Christiani Matras, og Marianna hevur greitt frá og stuðlað henni at skriva um skaldskapin. Anne-Kari skrivar m.a. í formælinum: »Etter hvert forsto jeg at en utkant kan være »verdens navle«, der en som Willian Heinesen kan veksle blikk med syvstjernen, og som Christian Matras høre en allheimstone i havbruset«.

Fyri stuðul í arbeiði sínum við ritgerðini hevur Anne-Kari eisini eina stóra tøkk at bera Føroya Læraraskúla og Árna Dahl.

Úrslitið er undir øllum umstøðum ein sera áhugaverd bók um skaldið Christian Matras og hansara skaldskap, sum hevur ríkað okkum øll við sínum eyðkenda lag, ið vit venda aftur og aftur til. Í bókamentaskránni eru ikki færri 145 yrkingar nevndar, og teirra millum sjálvandi allar tær, vit ikki troyttast av at syngja við so mong høvi.

Bókin um skaldið Christian Matras – við vevnaði eftir Marionnu Matras á permuni – er 332 bls. Forlagið í Oslo (www.unipub.no, t-postur unipub@sio.uio.no) selur bókina fyri NOK 358,- . Bíleggingar kunnu umframt til forlagið sendast til netbókahandilin www.gnist.no Eitt avmarkað tal av bókini er at fáa í bókasølunum í Havn fyri 350 kr. eintakið.

Anne-Kari Skarðhamar er í løtuni stødd í Føroyum í sambandi við verjuna av ph.d.-ritgerðini hjá Kirsten Brix: Dialog i Babelstårnet. Analyse af Regin í Líðs fiktive prosaforfatterskab. Verjan verður á Føroya Studentaskúla í Hoydølum fríggjadagin 14. juni kl. 13. Kirsten Brix er tann triðja, sum verjir ritgerð við Fróðskaparsetur Føroya. Teir, sum frammanundan hava fingið ph.d.-heitið frá setrinum, eru Jóannes Dalsgaard og Andras Mortensen, sigur Føroya Fróðskaparfelag í tíðindaskrivi.



# Fólk væl nøgd við nýggja tivoliøkið



*Tað eydnaðist væl at flyta tivoliøkið inn í "hjartað" í Runavíkar kommunu. Sunnukvøldið var gott veður, og nógv fólk hugnaðu sær á nýggja tivoliøkinum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Nógva regnið leygardagin gjørdi, at kappróðurin eydnaðist ikki so væl í peningi, men tað var eitt stórt plástur á sárið hjá kappróðrarfelagnum, at Eysturoyingur vann ein so spennandi róður**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

At skipa fyri eini summarstevnu, krevur nógv fólk, nógva tíð og nógva arbeiðsorku. Ein hópur er at fyrireika, áðrenn ein stevna fer at bakkastokki, og fólk kunnu njóta tey tiltøk, sum nú einaferð eru fingin upp at standa.

Avgerandi fyri, at uttanduratiltøkini eydnast, er veðrið, og tá ið vit búgva í Føroyum, er eingin trygd fyri, at vit fáa tað veður, sum øll nú einaferð ynskja sær.

### Regn leygardagin

Veðrið á eystanstevnu, sum seinasta vikuskiftið varð hildin í Runavík, Saltangará og á Glyvrum, var einki at reypa av.

Leygardagin regnaði illa, og tað regnaði at kalla alla náttina, men lotið var lítið og einki.

Undir kappróðrinum var regn, og tað regnaði eisini á midnátt, tá ið midnáttarløtan var.

Tað var Kappróðrarfelagið NSÍ, ið skipaði fyri kappróðrinum, sum í pengum ikki gav tað, sum fólk høvdu vónað. Hinvegin var tað eitt stórt plástur á sárið hjá felagnum, at 10-mannafarið, Eysturoyingur, vann ein so spennandi róður í harðari kapping við Vestmenning og Klaksvíking.

Somuleiðis er tað ein uggi, at tað gekk ógvuliga væl at avgreiða kappróðurin hendan dagin.

Hóast regnið, eydnaðist midnáttarløtan leygarkvøldið væl. Rættiliga nógv fólk var samankomið á Torginum at lýða á røðuna hjá Edvardi Joensen og vera við í teimum tiltøkum, sum har vóru. Henda løtan endaði við fýrverki.

### Góður sunnudagur

Helst var einki regn eftir á himli, tá ið sunnudagurin kom, tí hendan dagin var turt og gott veður, og nógv fólk hevði leitað sær á tivoliøkið.

Sosialurin var fram við og tók nakrar myndir.

Fyrireikararnir til stevnuna siga seg fegnast um, at tivoliøkið er flutt inn á økið niðanfyri Maskinhandilin, tí hetta vísti seg at rigga serstakliga væl og samlaði nógv fólk - ikki minst sunnukvøldið í tí góða veðrinum, ið var.

Samanumtikið kunnu vit siga, at hóast vánaligu stevnulíkindini leygardagin og leygarkvøldið, stendur sunnudagurin eftir í minninum hjá stevnugestunum sum ein góður og væleydnaður dagur.

Feløgini, sum skipaðu fyri eystanstevnuni, eru í fyrsta lagi NSÍ, Støkk, Kappróðrarfelagið NSÍ, Hondbóltsfelagið Tjaldur, Mentanarhúsfelagið og Bátafelagið á Bakka.

Somuleiðis vóru onnur smærri feløg og einstaklingar við í fyrireikingunum, og tað var Eysturoyar Kunningarstova, sum átti sín lut í, at alt sampakkaði, tá ið saman um kom.



*Tvær fittar eystanstevnudiddur við bamsu og rósum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hesar fóru ikki tómhentar heimaftur. Onnur hevði vunnið eina stóra bamsu.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen.*



*Hugnaligt var at spáka í tivoliøkinum sunnukvøldið, og ljósini frá básunum vóru vøkur á at líta*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*